www.sosialurin.fo Leyst starv á Sosialinum




## Redaktiónsleiðari

### -Vilt tú vera við til at mynda dagsskránna í Føroyum?

Á Sosialinum sóknast vit eftir einum redaktiónsleiðara, sum saman við blaðstjóranum skal leggja til rættis framleiðslu av tíðindapartinum av Sosialinum.

Sum redaktiónsleiðari verður tú við til at seta dagsskránna í føroyska tíðindaheiminum, har Sosialurin og Miðlahúsið í dag fevna um ein týðandi part av tíðindastreyminum, har vit gjøgnum fleiri miðlapallar eru við til at mynda føroyska samfelagið.

Vit sóknast eftir einum persóni við royndum innan yrkið, sum hevur gott yvirblikk, og sum eisini dugir at planleggja gerandisdagin - tó at nógvir óvæntaðir lutir altíð kunnu stinga seg upp á eini rokmiklari redaktión. Coaching og evaluering av blaðfólkum og arbeiði teirra er eisini týðandi partur av starvinum.

Vit vænta, at umsøkjarar hava viðkomandi útbúgving ella roynd innan tíðindaheimin.

Eitt grafiskt eyga og evni at seta upp tíðindasíðurnar sjálv/ur er eisini ein fyrimunur, men tó eingin treyt.

Løn sambært avtalu.

Vilt tú vita meira um starvið, ert tú sjálvandi vælkomin at seta teg í samband við Jan Müller, stjóra, ella Eirik Lindenskov, blaðstjóra. Eisini ber til at senda teldubræv til jan@sosialurin.fo ella eirikur@sosialurin.fo.

Áhugaðir umsøkjarar skulu innan 16. oktober senda umsókn og viðkomandi upplýsingar til:

Sosialurin
Jan Müller
Postsmoga 76
110 Tórshavn

Umsóknir kunnu sjálvandi eisini sendast við telduposti til jan@sosialurin.fo

*Sosialurin er ein fyritøka í støðugari menning. Hvønn gerandisdag eru vit á gøtuni við hópin av tíðindum. Blaðið er eisini at finna á alnetinum, har vit eisini røkja tíðindaflutningin á portal.fo, planet.fo og sportal.fo. Á Sosialinum starvast í dag um 25 starvsfólk.*




sp/f O.K. HEILSØLA & MASKINUR

430 HVALVÍK · TEL 42 23 94






### Biografurin í Voss

Tá tú hevur sett skíðfjalarnar frá tær fyri dagin, hevur Voss eisini onnur tilboð til tey vitjandi. Eitt nú ber til at fara á matstovu ella í biograf í »Voss Kino«, ið hevur opið 3-4 ferðir um vikuna. Náttarlívið bjóðar eisini møguleika fyri at fara á pub ella á náttklubba.

Í samstarvi við Smyril Line fara vit hvønn dag í 14 dagar at skipa fyri eini spurnarkapping. Nýggjur spurningur verður hvønn dag í Sosialinum. Jú fleiri svar tú sendur inn, jú fleiri møguleikar hevur tú at vinna. Svarlepin skal tó vera kliptur úr blaðnum – avrit verður ikki góðtikið. Seinasta freist at senda inn er mikudagin 18. oktober. 2006.

**Vinningur:** Ferð fyri 2 vaksin og 2 børn við bili á leiðini Tórshavn-Bergen og aftur í 4 koyggjukamari við vindeyga og wc/bað. Allar máltíðir umborð eru íroknaðar. Hartil 9 nætur í íbúð fyri 4 persónar á Fleischers Apartment í Voss í Noregi. (máltíðir ikki íroknaðar). Virðið á ferðini er uml. kr. 11.995,-.

### Dagsins spurningur

Hvussu ofta er biografurin í Voss opin um vikuna?

- [ ] 1 ferð
- [ ] 3-4 ferðir
- [ ] Hann er opin alla vikuna

Navn: ____________________

Bústaður: ____________________

Tlf. nr: ____________________

Sendi okkum loysnina til:
Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn
Merk brævbjálvan »Skíðkapping«







VIRÐI: 11.995,-

Sosialurin